# Bíligar bátar úr Íslandi

Fíggjarkreppan í Íslandi ger, at útróðrarmenn í øðrum londum kunnu fáa fatur á einum íslendskum útróðrarbáti fyri ein lutfalsliga bíligan penga. FiskeribladetFiskaren skrivar um ein norðmann, sum hevur keypt sær ein 29 føtur stóran glastrevjabát úr Íslandi fyri 340.000 norskar krónur. Við frakt og øðrum kostar báturin 400.000 norskar krónur, og maðurin sigur við blaðið, at í Noregi hevði ein tílíkur bátur kostað millum 800.000 og 900.000 norskar krónur. Báturin er av slagnum Sómi-870, smíðaður í 1999 og er væl útgjørdur.



*Tað kostar tvær ferðir so nógv at keypa ein tílíkan bát í Noregi (Mynd: FiskeribladetFiskaren)*





*Verner Olsen arbeiðir eisini hjá Valhalla*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

*Er tað serliga mánadag og fríggjadag, tá farmaskipið siglir av Toftum, at nógv er at gera?*

*Hvussu gamalt er felagið, sum rekur virksemið í dag, og hvussu eru eigaraviðurskiftini?*

*Hvørjar uppgávur hevur virkið - skiljing og pakking av feskum fiski?*

*Hvussu deila fiskasløgini seg gjøgnum árið - umleið?*

Í samrøðu við Jansy Olsen og í teldupostinum løgdu vit aftrat, at vit á ongan hátt vilja virkinum ilt, men at vit bara hugsaðu um at fáa eitt sindur av kjøti upp á ein greinastubba við myndum av fólki, sum eru til arbeiðis. Í teldupostinum løgdu vit eisini aftrat, at tey vóru vælkomin at svara skrivliga.

Men á Valhalla ráddi tøgn...

Vit skiltu á Jansy, meðan vit prátaðu í túninum, at ikki minst línumenn eru sera fegnir um, at vit í Føroyum hava fiskaútflytarar, sum arbeiða við skiljing og pakking av feskum fiski.

- Hetta er við til at halda prísunum uppi, legði hon aftrat.

Sosialurin hevur tí í aðrari grein á hesi opnu tosað við Jóhannus Olsen, formann í Felagnum Línuskipum um týdningin av feskfiskaútflytarum.

## 14 fólk í starvi

Sambært vinnuskráum eru 14 fólk knýtt at virkseminum hjá Valhalla á Toftum, og ein av uppgávunum hjá felagnum er heilsøla av fiski og fiskavørum.

Valhalla keypir fiskin, sum felagið útflytir, men vit hava eisini havt onnur virki í Føroyum, sum bara skildu og pakkaðu fisk fyri fiskakeyparar.

# Útflytarar hava stóran týdning fyri fiskaprísin

**- Vit hava brúk fyri at hava feskfiskaútflytarar, sum kunnu vera við til at halda fiskaprísunum á sama støði, sum eitt nú í Skotlandi, sigur formaðurin í Felagnum Línuskipum, Jóhannus Olsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi millum reiðarar, fiskimenn og fiskaseljarar annars, at vit í Føroyum hava virkir og keyparar, sum leggja sína orku í at útflyta feskan heilan fisk.

- Jú, tað er so heilt vist, at vit hava brúk fyri hesum útflytarum. Tey eru við til at halda fiskaprísunum uppi og eru við til at gera, at vit fáa ein prís, sum á leið svarar til marknaðarprísin um okkara leiðir.

Tað sigur Jóhannus Olsen, formaður í Felagnum Línuskipum, sum sjálvur eisini er útgerðarmaður hjá fleiri línuskipum.

Hann leggur aftrat, at ikki minst, nú virkir, sum keyptu og virkaðu hýsu, eru stongd, er serliga umráðandi, at vit hava hesi virkir og fiskaútflytarar.

- Virkið í Miðvági, Kósin og Norðís, sum øll keyptu hýsu, eru nú stongd, og tí er avmarkað, hvørjir keyparar eru í Føroyum til hýsuna.



*Jóhannus Olsen er formaður í Felagnum Línuskipum og útgerðarmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Fer at batna

Jóhannus vísir á, at línuskipini hava ikki fingið so nógva hýsu enn, men hann væntar, at hýsufiskiskapurin fer at batna, sum tíðin gongur.

- Teir gomlu søgdu, at tá tað fór at hvítna niður eftir fjøllunum, fóru skip og bátar eisini at fáa meira hýsu, og í løtuni vísir tað seg, at fiskiskapurin batnar. Vit hava góðar vónir um, at hýsufiskiskapurin fer at kvinka rætta vegin, leggur hann aftrat.

Formaðurin í Felagnum línuskipum vísir á, at vit í Føroyum hava fleiri týdningarmiklar fiskaútflytarar. Talan er feløg, sum keypa fiskin og selja hann víðari, og talan er eisini um feløg, sum selja fisk fyri skip og bátar.

- Hetta eru eitt nú Valhalla og Rainbow Seafood, men vit hava eisini fleiri aðrar, sum vit meta hava stóran týdning fyri prísin – fyri ikki at gloyma Fofish í Saltangará, sigur Jóhannus Olsen, reiðari og skipaeigari.



*- Fiskaútflytarar hava stóran týdning fyri fiskaprísin í Føroyum, sigur formaðurin í Felagnum Línuskipum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*